# Hundar leggjast á seyð í Sørvági

**Í Sørvági gera hundar av álvara um seg í haganum og hundaóskilið er orsøk til, at lomb og seyður í hópatali missir lív.**
**- Ein røktingarmaður sá fyri stuttum tveir hundar, ið skiftivís skræddu síðurnar úr einum lambi**

HUNDAÓSKIL

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

– Fleiri lomb ganga beinbrotin og bakbeinini eru gnagað av. Tað er ein óhugnalig sjón, sigur Rodmund á Kelduni, hagastýrisformaður í Ytra Suðurtriðingi í Sørvági.

- Ein røktingarmaður sá fyri stuttum tveir hundar, ið skiftivís skræddu síðurnar úr einum lambi, sigur Rodmund.

- Í okkara haga mangla vit nú 6 lomb og 10 seyðir, sigur Rodmund á Kelduni, ið ger vart við, at óskilið við leysum hundum hevur staðið við longi, og at tað er stórur fíggjarligur missur hjá teimum, ið eiga seyð, um hundar taka meginpartin.

-Eg kalli hetta djórapínslu, sigur hann avgjørdur.

Í Sørvági gera hundar av álvara um seg í hagnum og lomb og seyður í hópatali missir lív.



### Seta fólk at ansa

- Vit sendu skriv í 2001 til kommununa og fóru so eisini á fund við kommunu og løgregluna. Sørvágs Kommuna og Fútin avtalaðu, at fólk skuldi setast at taka sær av hesum, men enn er onki fólk sett og so vítt eg veit, er ikki søkt eftir fólki enn, sigur Rodmund á Kelduni.

- Onki hendir, og eg havi enntá sjálvur bjóðað meg fram og sagt frá, at eg eri áhugaður í starvinum, men ein hoyrir slíkar grundgevingar sum, at fólk fæst ikki til starvið, sigur Rodmund

### Eru børnini næst?

- Hetta er ikki nøktandi. Nær gongur tað út yvir børnini? Foreldur hava klagað, tí talan er um rættiliga stórar hundar og ávísar hundar, ið gera um seg, sigur Rodmund.

- Sáttmáli er skrivaður um at vetrarfriða bygdina, men ábyrgd má fylgja við, og um nakað, so hevur trupulleikin við hundum størri týdning, sigur Rodmund á Kelduni.

Hagastýrini hava prátað saman og hava ætlanir um at fáa fund við kommununa fyri at krevja, at endi fæst á hundaóskilinum, ið kostar ótali av seyði lívið.

# Vit varpa ljós á bróstkrabba

**- Bót til bata skipar fyri almennum fyrilestri. Leygardagin 21. oktober klokkan 15.00 skipar Bót til bata, ið er sjálvhjálparbólkur undir Føroya Felag móti Krabbameini, fyri almennum fyrilestri í Miðlahúsinum í Havn í sambandi við altjóða bróstmánaðin, sum er oktober á hvørjum ári**

KRABBAMEIN

Maria Frederiksen fer at siga frá søgu síni. Hon er født og uppvaksin í Føroyum, men hevur seinastu nógvu árini búð í Danmark. Bert 22 ára gomul fekk hon krabbamein fyrstu ferð, aðru ferð tíggju ár seinni, og fyri seks árum síðan fekk hon staðfest krabbamein í bróstinum. Somuleiðis fer Tina Hammer at siga frá søgu síni. Hon er 28 ára gomul, donsk og býr í Danmark, men er gift føroyingi, sum hon eigur ein fýra ára gamlan son saman við. Fyri tveimum árum síðan fekk Tina staðfest bróstkrabba; hon fekk eftirviðgerð og alt sýntist at ganga væl. Men fyrr í ár kom sjúkan aftur og nú hevur hon breitt seg til livrina og heilan. Tina fær aftur kemoviðgerð og stráluviðgerð. Tina fer at greiða frá, hvussu tú kanst hava eitt virðiligt lív, hóast sjúkan er komin aftur og tú veit, at tú ikki verður frísk aftur. Tina var fyrr í hesum árinum í "Alt for damerne", har hon segði frá søgu síni, og somuleiðis í sendingini hjá QTV fyri góðum tveimum vikum síðan.

Øll eru hjartaliga vælkomin at lurta eftir, hvat Maria og Tina hava at siga frá. Undir tiltakinum fara limir úr sangbólkinum Salt at spæla og syngja.

Bróstmánaðurin endar við tiltaki í felagshølunum hjá Føroya Felag móti Krabbameini á Grønlandsvegnum í Havn týsdagin 31. oktober. Tá verður opið hús fyri kvinnur, ið hava ella hava havt bróstkrabba. Tær, ið hava hug at taka lut, kunnu siga frá áðrenn 30. oktober hjá Føroya Felag móti Krabbameini.

Føroya Felag móti Krabbameini: www.krabbamein.fo

Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag. Telefontíð frá kl. 13-15.

Skrivstova: Grønlandsvegur 58 Postboks 1216, 110 Tórshavn. - Telefon: 31 79 59
ffk@krabbamein.fo

# Kári P. spyr um Jógvan S. málið

**Kári P. Højgaard, formaður í Sjálvstýrisflokkinum, spyr løgmann um málið viðvíkjandi fiskiloyvinum til Jógvan S.**

POLITIKKUR

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Hví fekk Jógvan S fiskiloyvi? Hví bleiv hetta loyvi afturtikið? Og hvørji stig fer løgmaður at taka fyri at staðfesta ábyrgdina, nú landskassin mátti gjalda milliónaupphædd, tí tað í rættinum varð staðfest, at tað var ólógligt at taka fiskiloyvi aftur? Soleiðis ljóða spurningarnir, sum Kári P. Højgaard hevur gjørt at seta løgmanni.

Í viðmerkingunum til fyrispurningin, sigur Kári P. Højgaard millum annað, at higartil hevur hesin leikur kostað tí almenna nærum 3,1 milliónir, og er hesin peningur fingin til vega og goldin við einum fíggjarnevndarskjali.

Kári P. Højgaard sigur, at har landskassin verður dømdur at gjalda milliónaupphæddir í endurgjaldi, krevur eina neyv frágreiðing um, hvør hevur ábyrgdina. Og ætlanin er ikki at hetta skal takast upp til viðgerðar í tinginum.

Nógvir spurningar standa ógreiðir og ósvaraðir, sigur Kári P. Højgaard. Løgmaður hevur ábyrgdina av landsstýrismonnunum, men løgmaður hevur í øðrum førum víst á, at hann onga ábyrgd tekur av hendingum, ið farnar eru fram, áðrenn hann tók við sum løgmaður. Men umbønin við fíggjarnevndarskjali til at gjalda inntøkumissin hjá saksøkjaranum á knappar 3 milliónir er undirskrivað av landsstýrismonnunum Bjørn Kalsø og Bárði Nielsen tann 4. august 2006.

Tingið atkvøður um fyrispurningin týsdagin 17. oktober.

## Argentiskur/ íslendskur tango!

TANGO

Tangodansararnir í Føroyum eru framvegis aktivir.

Nú er aftur høvi at fáa eitt vikuskiftisskeið í Argentinskum tango. Tann 28. og 29. oktober halda íslendsku hjúnini Bryndis Halldórsdóttir og Hany Hadaya skeið fyri øll ið hava hug at dansa argentinskan tango.

Skeið er fyri bæði teimum sum hava roynt tað fyrr, men eisini fyri teimum sum hava lítlar ella ongar royndir frammanundan, og sum hava hug at royna seg kortini. Best er um tú hevur ein dansipartnara við, men um tað ikki letur seg gera, kanst tú spyrja teg fyri hjá fyrireikarunum.

Íslendsku hjúni hava dansað klassiskt og modernað síðani 1988, og seinnu árini sum lærarar í Tangofélagnum í Reykjavík.

Skeiðið verður í veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum, og fólk tekna seg hjá Anne Lise Winther, tlf. 315310/257757, teldupostur alwinther@hotmail.com